# Vikuskifti

Nr. 15 • fríggjadagur • 20. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo



*– Tað letur til, at fólk bara hava góðtikið tey heimleysu sum ein part av dagligu býarmyndini í Havn. At tað er í lagi at vera heimleysur. Men tað líkist svartasta ongum í einum vælferðarsamfelagi, heldur Páll Oddur Rubeksen, sum hevur skrivað sangin, Herbergið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kor teirra heimleysu

Landsstýrismaðurin í almanna– og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur boðað frá, at hann fer at leggja uppskot um kor teirra heimleysu fyri tingið. Sosialurin hevur eitt tema um tey heimleysu í blaðnum í dag, har millum annað verður nomið við, hvussu støðan veruliga sær út í dag. Hvørji tilboð eru til tey heimleysu? Hvør skal hava ábyrgdina av teimum heimleysu? Hvørji tiltøk skulu setast í verk fyri at hjálpa teimum heimleysu, sambært álitinum um heimleys? Hvat siga politikararnir og avvarðandi myndugleikar um støðuna í dag?